# Dvørgur í stórum samtaki

**Oljufeløgini, sum hava leitiloyvi undir Føroyum, hava tikið seg saman í samtak, sum skal lætta um leitingarnar í framtíðini**




OLJUSAMTAK
*Edvard Joensen*

Hóast tey eru stór, hava tey valt ein dvørg at vera búmerki sítt. Oljufeløgini, ið hava leitiloyvi undir Føroyum, og sum hava tikið seg saman í samtak saman við Jarðfrøðissavninum at gera komandi leitingar léttari.

Samtakið eitur Sindri og er kallað upp eftir navnframa dvørginum Sindra úr norrønu gudalæruni.

Sindri búði langt niðri í jørðini. Var sera gløggur og smiður av teimum allarbestu. Helst bestur. Tað vóru heldur ikki hissini verk, hann legði úr hondum. Eitt nú Mjølnir, hamari Tórs og ketan, sum Fenrisúlvurin varð bundin við.

Martin Heinesen, leiðari á Jarðfrøðissavninum greiðir frá, at tað var treyt, tá leitiloyvini vórðu givin, at feløgini, sum fingu hesi loyvi, skuldu binda seg til at luttaka í arbeiðinum við at gera framtíðar leitingar léttari. Tað kundi vera við at leggja pengar í eina verkætlan og við beinleiðis at taka lut í tí arbeiði, sum verkætlanin umfatar.

Tað er nevniliga als ikki lætt at leita eftir olju undir Føroyum, sigur Martin Heinesen. Basaltið undir okkum er hart og ringt at koma ígjøgnum.

– Tað er nevniliga ikki av tilvild, at øll leitiloyvini, givin eru, liggja so miðsavnað har, tey liggja, sigur hann. Har verða mettir bestir møguleikar at arbeiða við teiri tøknifrøði, vit kenna í dag.

Men kanska fara partarnir í Sindra at finna fram til aðrar hættir, sum tíðin líður.

Tað var ein treyt fyri at fáa leitiloyvi, at arbeiðið við hesi verkætlanini skal halda fram, alla tíðina, loyvini eru galdandi, sigur Martin Heinesen.

Tá finnast skuldi fram til eitt felags heiti og búmerki, varð umboðsmaðurin hjá oljufelagnum Anadarko, Johan Mortensen, settur á uppgávuna. Hann vendi sær til Jóhan Hendrik Winther Poulsen at finna eitt hóskandi navn. Og haðani er hugskotið um dvørgin Sindra komið.

Eitt frálíkt hugskot, halda oljufólkini. Ímyndar intellegens, og gott arbeiði. Hann situr í jørðini og slær á meitilin, sum, hóast tøknifrøðin í dag er øðrvísi, er júst tað sama, sum oljufeløgini í dag gera. Navni er lætt at siga og kann nýtast bæði á føroyskum og enskum.

Tað er Anker Eli Petersen, sum hevur teknað búmerkið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið seinnapartin. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og okkurt ælið, men seinnapartin andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, mikudagin lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 9 og 13 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 21 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 32 |
| Malorca | 35 |
| Athen | 31 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 32 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Føroyar stendur mestsum í stað og grynnist.




Lágtrýstið við Føroyar grynnist og eitt minni hátrýst við Jan Mayen mennist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/08 kl. 06[00]– 03/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 02/08 kl. 06[00]– 03/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í aug.: 8,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Fullmáni
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 4. aug | 07.48 | 20.11 | 06.48 | 19.11 | 07.03 | 19.26 | 09.48 | 22.11 | 10.48 | 23.11 | 06.03 | 18.26 | 05.03 | 17.26 | 08.03 | 20.26 | 09.03 | 21.26 | 07.33 | 19.56 | 08.48 | 21.11 |
| 5. aug | 08.35 | 20.55 | 07.35 | 19.55 | 07.50 | 20.10 | 10.35 | 22.55 | 11.35 | 23.55 | 06.50 | 19.10 | 05.50 | 18.10 | 08.50 | 21.10 | 09.50 | 22.10 | 08.20 | 20.40 | 09.35 | 21.55 |
| 6. aug | 09.15 | 21.33 | 08.15 | 20.33 | 08.30 | 20.48 | 11.15 | 23.33 | — | 12.15 | 07.30 | 19.48 | 06.30 | 18.48 | 09.30 | 21.48 | 10.30 | 22.48 | 09.00 | 21.18 | 10.15 | 22.33 |
| 7. aug | 09.52 | 22.10 | 08.52 | 21.10 | 09.07 | 21.25 | 11.52 | — | 00.33 | 12.52 | 08.07 | 20.25 | 07.07 | 19.25 | 10.07 | 22.25 | 11.07 | 23.25 | 09.37 | 21.55 | 10.52 | 23.10 |





Antennu-monteringar
- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
Fokus ELEKTRONIK
J. Broncksgøtu 34
Tlf. 311306 - Fax 311306

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

fk




Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544